

*Føroyingar útbúgva seg longu til oljuverkfrøðing í Stavanger*

# Útbúgving av oljuverkfrøðingum

## *á Fróðskaparsetrinum og Høgskolen í Stavanger*

Fróðskaparsetur Føroya og Høgskolen í Stavanger hava í seinastuni havt samráðingar um eina samstarvsavtalu um útbúgvingar av verkfrøðingum til oljuvinnuna. Í fyrstu syftu er hugsað um verkfrøðingar, sum skulu hava førleika at arbeiða við leiting eftir olju og við útvinning av olju. Fyrstu útbúgvingaravtalurnar eru nú klárar at undirskriva.

Í stuttum kann sigast um avtalurnar, at tær m.a. miða eftir, at stovnarnir samstarva um uppbygging av eini 3 1/2 ára endaligari *BS útbúgving* í »oljuverkfrøði« á Fróðskaparsetrinum og um framhaldsútbúgvingar til *civilverkfrøðing* á Høgskolen í Stavanger fyri lesandi, ið hava tikið eina BS-útbúgving ella eina 2 ára náttúruvísindaliga støðisútbúgving á Fróðskaparsetrinum. Arbeitt verður eisini við ætlanum, har studentar á Fróðskaparsetrinum kunnu halda fram á Høgskolen í Stavanger eftir loknað 2 ára støðisútbúgving á Fróðskaparsetrinum og blíva *»høgskoleingeniør«* (ein íalt 3-ára útbúgving) frá Stavanger.

Í Føroyum er enn avmarkað við lærarakreftum til slíkt útbúgvingarvirksemi, og tí verður neyðugt at fáa útlendskar serfrøðingar higar at undirvísa, t.d. frá Høgskolen í Stavanger. Hetta vil vera við til at menna uppbygging av kompetansu til oljuvinnuna millum føroyingar.

Í ætlaða undirvísingarvirkseminum á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum verður eisini dentur lagdur á, at eitt nú útbúnir verkfrøðingar í Føroyum kunnu innskriva seg til »oljurelaterað« skeið. Tað er vælkent aðrastaðni, at fólk, ið frammanundan hava eina útbúgving, eftirútbúgva seg til at hava førleika at arbeiða í oljuvinnuni.

Samstarvsavtalan millum Fróðskaparsetur Føroya og Høgskolen í Stavanger verður undirskrivað 26. februar 1997 á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

# Árligu limafundirnir hjá Javna

Tað eru nú 3 ár farin síðan bygnaðurin í Javna varð broyttur. Endamálið við broytingini, var at koma nærri menningartarnaðum og teirra avvarandi kring í landinum. Um trupulleikar koma, so er umboðsnevndin á staðnum at heita á.

**10. mars 1997 kl. 19.30** verða árligau limafundirnir runt í økisfeløgunum. Heiti á fundunum er felags: »Hvussu kunnu politikarnir brúka Javna«. Avgerðir menningartarnaðum viðvíkjandi hava fyri tað mesta verið tiknar av landspolitikarum. Javni ynskir at venda eygunum á kommununum á hesa teirra borgarar.

Javni hevur eitt nært samband við norðurlond, og vit siggja, at menningartarnað í Føroyum eru væl við, men tað eru nøkur økir sum ikki enn eru á líkafót við onnur í Føroyum. Javni ynskir at koma á tal við politikarnar runt í Føroyum at ráðgeva, og hoyra hvat tey halda vit kundu havt eitt nærri samband og samstarv um.

Grundreglurnar - í norðurlendsku vælferðarskipanini, ið viðtikin varð á Norðurlanda fundi - eru tengdar at Javna'sa arbeiði á tann hátt, at endamál felagsins skal fremjast eftir hesum reglum.

Í hesum reglum stendur, at trupulleikar verða at loysa á tí øki, har teir stinga seg upp. Eisini stendur at politikkur teirra brekaðu er ikki bert almannapolitikkur, men eisini samfelagspolitikkur. Ábyrgdin er hjá okkum øllum.

Við hesum vísir Javni á, at vit ynskja at verða kunnað um og tikin við uppá ráð, tá skerjingar verða gjørdar á økjum hjá menningartarnaðum, so at tey, ið eru kring tey, kunnu taka hædd fyri hesum ta tíð, til tað aftur verður annarleiðis.

Javni kann heldur ikki góðkenna allar skerjingar, ið verða gjørdar - hvørki hjá børnum ella vaksnum.

Hetta eru menniskju, sum ikki kunnu tak »pausu« í nøkur ár. Tey skulu liva hvønn dag.

Á fundunum verða politikarar frá økjunum.

Í Klaksvík verður fundurin á Tekniska Skúla. Í Eysturoynni á Felagsskúlanum á Oyrabakka. Á miðstaðarøkinum í Vestmanna. Á Vágoynni í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági. Í Suðuroy verður fundurin í Fjallbrúður í Vági.

Annar partur av fundunum er, at limirnir velja umboðsnevnd.

Í viðtøkum felagsins stendur, at umboðsnevndarlimirnir skulu hava bústað ella varða av einum menningartarnaðum, sum hevur bústað í økinum.

Øll eru hjartaliga vælkomin á fundirnar.

Nýggir limir kunnu tekna seg.


Norðurlanda HÚSIÐ í Føroyum

**Stipendium til Åland og Grønland**

Nordens Hus udlyser hermed et stipendium på indtil

DKR.-25.000,00 til studierejse til Åland og Grønland

Stipendiet er regnet til kulturarbejde, journalister og lærere bosiddende på Færøerne. Stipendiet skal anvendes inden udgangen af 1997. Skriv ansøgningen på dansk, norsk eller svensk og send ansøgningen til:

Nordens Hus på Færøerne
Postboks 1260
110 Tórshavn

Ansøgningen kan også sendes til telefax 1 19790. Fristen at søge er fredag 28. februar 1997.

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

TIL *VÁGAFÓLK*

**Rúsevni!**

**(Alkohol, tablettir, hasj, osfr.)**

*Hjálp til rúsevnismisbrúkarar OG/ELLA teirra familjur!*

**Hósdagin 27. febr.** er høvi at hava viðtalu við Jegvan Bæk, sálarfrøðing, á Læknamiðstøðini í Miðvági.

Ring tlf. 15575 og avtala tíð.

**Blákross-heimið**